# Lóg um rættindi teirra sálarliga sjúku avoldað

**Galdandi lóg um rættindi teirra sálarliga sjúku í Føroyum er frá 1938 og er avoldað. Lógin tryggjar ikki einstaklingum rættindi, sum eru eyðsæð. Tað hevur ført til, at samfelagið í dag ikki sær seg føran fyri at liva upp til sína ábyrgd mótvegis teimum, sum eru rakt av sálarliga sjúku**

HEILSUVERKIÐ
*Marjun Dalsgaard*

Rættindi teirra sálarliga sjúku í Føroyum eru ikki lógarfest. Tad er, millum annað, niðurstøðan hjá arbeiðsbólkinum, sum í nov. 2000 undir táverandi landsstýriskvinnu í Almanna- og Heilsumálum, Helenu Dam á Neystabø, var settur at kanna tørvin hjá teimum sálarliga sjúku í Føroyum. Álitið frá arbeiðsbólkinum, sum ber heitið "Ein glotti fyri framman," var liðugt í apríl í 2001, og her verður heitt á mynduleikarnar um at broyta galdandi lóg um rættindi teirra sálarliga sjúku í Føroyum. Somuleiðis sigur formaðurin í felagnum Sinnisbati, at lógin er avoldað, og at hon ikki tekur hædd fyri rættartrygdini hjá tí einstaka. Lógin, sum er frá 1938, hevur eisini verið galdandi í Danmark, til hon bleiv broytt í 1990 til eina meira tíðarhóskandi lóg. Svenning av Lofti, formaður í Sinnisbata sigur, at munurin er til dømis, at í Danmark hevur einstaklingurin krav uppá at fáa ein talsmann, sum fylgir viðkomandi frá tí stund, hann kemur í samband vid heilsuskipanina. Hetta skal, millum annað, tryggja sjúklinginum, at hann ikki verður koyrdur undir viðger, sum hann ikki ynskir. Hóast álitið frá apríl 2001 mælir til, at lógin verður broytt, sigur Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður í Almanna- og Heilsumálum, at eingin arbeiður við at broyta lóggávuna enn. Ein arbeiðsbólkur er settur at samskipa framtíðar psykiatriina í Føroyum, og bíðað verður eftir, at hetta álit er liðugt, áðrenn nakað verður gjørt við málið.

### Einki hent í 20 ár

Niðurstøðan í álitinum "Ein glotti fyri framman" fra apríl í 2001 er eisini, at samfelagið eigur at tryggja borgarum, við serligum tørvi, bútilboð og tilboð um arbeiði ella endurútbúgving. Trupuleikin er, at tað ikki stendur nakrastaðni í føroyskari lóg, hvør hevur ábyrgdina av hesum. Sámal Petur í Grund sigur, at lógin um stuðul frá tí almenna til eitt heim ikki verður broytt av tí orsøk, at samfelagið ikki megnar hesa uppgávu.

- Hóast vit broyta lóggávuna á økinum, kann samfelagið ikki liva upp til hesa ábyrgdina, sigur hann.

Einki hevur verið gjørt á umráðnum í 20-25 ár. Úrslitið er, at 77 fólk við sálarligum líðingum í dag hava bráneyðugan tørv á bútilboðum uttanfyri heilsuverki. 40 av teimum hava sín bústað á Landssjúkrahúsinum. Við teimum íløgum tað almenna fer at gera á økinum í dag, kunnu einans 10 fólk rokna við, at fáa búðtilboð komandi tvey árini.

### Eitt lítið stig á vegnum

Formaðurin í Sinnisbata, Svenning av Lofti heldur kortini, at tað er positivt, at tað almenna nú hevur játtað pening til 10 vardar íbúðir. Íbúðirnar røkja rættin, vit øll eiga at hava, til eitt privatlív. Samstundis skal onkur vera til staðar, sum ein kann venda sær til, um tørvur er fyri tí. Hann sær hetta sum eitt tekin um, at tað almenna hevur tikið ein part av síni ábyrgd, og tað er eitt stig á vegnum. Higartil hava øll keyp av húsum til sambýli og vardar íbúðir verið privat.

Í ár eru 4 mió. settar av fíggjarlógini til endamálið, og saman við teimum 3,5 mió., sum vóru játtaðar í fjørð, eru 7,5 mió. settar av til at betra bútilboðini hjá teimum sálarliga sjúku í Føroyum. Bústaðartrupulleikin hjá hesum bólki í samfelagnum, kann tó ikki loysast við eini eingangsupphædd. Økið hevur verið vanrøkt í so langa tíð, at tað krevur árligar játtanir av fíggjarlógini á eini 10 mió. inntil tørvurin er nøktaður, um trupuleikin veruliga skal loysast, sigur Svenning av Lofti.

# Rakul og aðrar søgur

ÚTGÁVA




Føroya Skúlabókagrunnur hevur givið út "Rakul og aðrar søgur" eftir Regin í Líð. Regin í Líð er dulnevni, sum Rasmus Rasmussen, eisini nevndur Rasmus á Háskúlanum, nýtti, tá ið hann skrivaði fagrar bókmentir.

Tær tríggjar stuttsøgurnar, Rakul (1907) og Minnisvarðin (1906) eru við í hesari útgávuni. Hetta eru søgur, ið lýsa sterkar kenslur, sum vinalag, kærleika, hjartasorg, og deyða, og skulu tí tala til ung. Eir í Ólavstovu hevur myndprýtt bókina við svørthvítum, ið lýsa persónar og umhvørvi um aldaskiftið.

"Rakul og aðrar søgur" er Snípubók í røðini Snípa - Klassikari. Lydia Didriksen hevur viðgjørt handritið lesinámsfrøðiliga og gjørt arbeiðsuppgávurnar. Lesinámsfrøðilig viðgerð er m.a., at greitt verður frá torskildum orðum. Orðafrágreiðingar eru prentaðar í marguni. Aftast í bókini eru arbeiðsuppgávur til hvørja stuttsøgu, spurningar og frágreiðingar til myndagreining í savninum. Arbeiðsuppgávurnar eru býttar sundur eftir torleikastigi í a-, b- og c-spurningar.

Jens Frederiksen, studentaskúlalærari, hevur greinað og tulkað eina mynd, sum dømi um, hvussu hetta gerst.

"Rakul og aðrar søgur" er vínreyð Snípubók við trimum fjaðrum, og merkir tað, at hon er ætlað elstu flokkum fólkaskúlans og miðnámsskúlum.

Í røðini Snípa - Klassikari verður givin út skaldskapur eftir høvundar, ið umboða sumt av tí besta, sum er skrivað á føroyskum. Hetta er onnur bókin í hesi røðini. Frammanundan er "Ábal og aðrar søgur" eftir Sverra Patursson givin út.

Bókin er 178 blaðsíður og fæst í bókabúðunum fyri 120 krónur.

# Nýggj nevnd

Á landsfundi KFUM-skótanna, sum var í Havn 2. februar, varð nýggj landsnevnd vald fyri næstu tvey árini.

Úr gomlu landsnevndini stillaðu Kári Olsen og Palli Mortensen ikki upp aftur. Palli Mortensen hevur verið formaður og skótaovasti í 8 ár, síðan 1994.

Nýggjur formaður og skótaovasti er Trygvi Sigurðsson, næstformaður er Arnold Hvalsrætt og landsnevndarlimir eru Kirsten Danielsen, Kjartan Dalsgaard, Johann Nielsen, Thomas Lambastein og Jens Petur Andreasen. Thomas og Jens Petur eru nývaldir í landsnevndina, meðan hini eru afturvald.



*f.v.: Johann Nielsen, Kjartan Dalsgaard, Jens Petur Andreasen, Trygvi Sigurðsson, Annold Hvalsrætt, Kirsten Danielsen*



# Nólsoyingar sera góðan útróður

**Mikudagin vóru bátarnir úti. Teir fiskaðu heilt væl; Trý Systkin hevði 3.500 pund, Annika 3.500 og Tóra hevði somuleiðis millum 3.000 og 4.000 pund.**



*– Nú verður so farið á Norðhavið um nakrar dagar. Vit gjørdu eitt gott vár í fjør. Haldi, vit fingu um 1.100 pund uppá dagin, og tað vóru vit væl nøgdir við, sigur Juul Jacobsen, útróðrarmaður*

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Dagarnir hava ikki verið nógvir, men teir, ið hava verið, hava verið góðir – ja, so góðir, sum fáur veit um at siga.

Fimm útróðrarbátar rógva út í Nólsoy; Tóra, Trý Systkin og Annika royna við línu, meðan Maj N og Nøvan royna við snellu. Síðstnevndu royna vanliga eisini við línu, men teir gera seg nú til reiðar at fara á Norðhavið um hálvan februar og royna tískil við snellu, áðrenn farið verður norður um.

### Góður dagur

Mikudagin vóru bátarnir aftur úti. Hendan dagin fiskaðu teir heilt væl; Trý Systkin hevði 3.500 pund á 12 stampum, Annika 3.500 pund á 20 stampum, og Tóra hevði somuleiðis millum 3.000 og 4.000 pund. Hvussu nógvar stampar Tóra setti, vita vit ikki, men helst hevur talið verið millum 12 og 20.

Hendan sama dagin vóru Maj N og Nøvan, sum júst hevur fingið nýggjan motor, við snellu; fyrrnevndi hevði 700 pund og hin 600 pund. Slagið var millumfiskur og toskur.

Sum skilst, hevur fiskiskapurin við snelluni verið smáligur, men hesin seinasti túrurin vignaðist hampiligt. Juul Jacobsen, sum eigur Maj N, sigur, at teir royndu uttarliga og eystarliga við hendan dagin.

– Vit plaga ikki at vera so uttarliga, sigur hann.

### Aðrir góðir dagar

Juul sigur, at hóast veðurlagið hevur verið rættiliga óstøðugt í seinastuni, so hava bátarnir gjørt fleiri góðar túrar við línu í ár.

– Næstsíðsta túr hevði Tóra góð 6.000 pund á 22 stampum, og túrurin undan hesum var eisini heilt góður. So, hetta er betri fiskiskapur, enn eg havi vitað um áður. Hann sigur, at slagið, útróðrarbátarnir fáa, er mest góður millumfiskur ogt oskur.

– Tá ið teir hava roynt innari á bleytum botni, hava teir fingið nógva smáhýsu, men úti á er lítil hýsa uppi í veiðini, sigur Juul.

Sum skilst, hevur tað gingið hampiliga væl at fingið egnarar í vetur. So, tað er greitt, at útróðurin skapar nógv í eini so lítlari bygd sum Nólsoy.

### Langir dagar

Allur fiskurin, sum útróðrarbátarnir í Nólsoy fiska, verður førdur inn á Toftir og seldur um uppboðssøluna.

– Hetta ger, at dagurin í minsta lagi gerst einar tveir tímar longri, enn um vit kundu lagt veiðina upp í Nólsoy. Vit noyðast at sigla 12 fjórðingar eyka hvønn tann einasta útróðrardag, tí teinurin er 6 fjórðingar hvønn vegin, úr Nólosoy og inn á Toftir.

Juul sigur, at stundum noyðast teir at bíða á Toftum, áðrenn teir sleppa fram at, og tá gerst dagurin uppaftur longri.

Spurdur, um teir stytta um útróðrardagin við at fara fyrri til lands, sigur hann, at tað gera teir ikki.

– Nú, vit royna við snellu, fiska vit so leingi, fiskurin tekur. So, hetta kunnu gerast langir útróðrardagar, sigur hann.

Eitt annað, sum útróðrarmenninir í Nólsoy hava at dragast við um vetrarnar, er vánaligu og ótryggu havnaviðurskiftini. Tosað hevur verið leingi um at bøta um hesi, men enn er so einki gjørt, sum ger, at útróðrarmenn kunnu vera tryggir við umstøðurnar, tá ið illveður er.

### Á Norðhavið

– Nú verður so farið á Norðhavið um nakrar dagar. Vit gjørdu eitt gott vár í fjør. Haldi, vit fingu um 1.100 pund uppá dagin, og tað vóru vit væl nøgdir við. Juul sigur, at teir hava fingið hús til leigu í Vík.

– Fiskurin verður landaður á Eiði, og síðan fara vit til Víkar at sova, sigur hann.

Útróðrarmaðurin sigur at enda, at seinasta summar royndist einki serligt, tí eingin sildafiskur var at fáa.

– Men so mikið betur royndist síðsta vár, og í vetur hevur nógvur fiskur verið at fingið við línu, sigur Juul Jacobsen.

# Fýra trolarar landa í Vestmanna

**Mánadagin, týsdagin og mikudagin var turt gólv á flakavirkinum í Vestmanna, men nú kemur gongd á aftur**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Í dag koma partrolararnir, Eysturbúgvin og Vesturbúgvin, inn at landa. Hesaferð landa báðir í Vestmanna. Teir seldu um telefonuppboðssøluna hjá Fiskamarknaði Føroya.

Í Vestmanna siga tey, at skipini høvdu 180.000 pund inni, tá ið 2-3 tóg vóru eftir av túrinum. So, væntandi verður hetta ein rímiliga góður túrur.

Slagið, skipini hava, er mest upsi, men fitt er eisini av toski og hýsu.

Fiskavirking í Vestmanna keypir bara upsan; toskurin fer á Toftir og hýsan til Miðvágs.



*– Tað er ikki óvanligt, at upsafiskiskapurin er slakari síðst í januar, men tekur seg uppaftur, tá ið upsin samlast at gýta um hálvan februar, siga tey á Fiskavirking í Vestmanna*

### Eisini landing fríggjadagin

Fríggjadagin koma partrolararnir, Fram og Vesturbúgvin, inn at landa. Teir høvdu 140.000 pund týsdagin, og slagið var nøkulunda tað sama, sum hjá Eysturbúgvanum og Vesturbúgvanum; upsi, toskur og hýsa. Aftur hesaferð endar upsin í Vestmanna, toskurin á Toftum og hýsan í Miðvági.

Mánadagin, týsdagin og mikudagin var annars turt gólv á Fiskavirking í Vestmanna. Men nú verður so nokk at gera teir næstu dagarnar.

### Vænta betri fiskiskap

Fiskiskapurin hjá trolarunum hevur verið slakari seinastu tíðina, enn hann var í fyrru helvt av januar.

– Nú er fiskiskapurin meira normalur aftur. Tað er vanligt, at upsafiskiskapurin minkar síðst í januar og tekur seg uppaftur um hálvan februar, tá ið upsin samlast aftur at gýta. Men hetta kann vera eitt sindur skiftandi, ár undan ári, siga tey á Fiskavirking í Vestmanna.